## Til minnis um góða starvsfelaga okkara

# Jóhannes Hansen

### Føddur 3. februar 1952 - deyður 16. mars 2009

Júst sum grækarismessa var farin framvið, og fyrstu tjøldrini hoyrdust láta, sum ber okkum boð um ljósari tíðir, komu tungu boðini um, at Jóhannes var slóknaður.

Jóhannes var ættaður úr Runavík, giftist til Fuglafjarðar og hevur búð í Fuglafirði síðani 1972. Hann byrjðaði at arbeiða á skrivstovuni hjá KJ Hydraulik í 1994. Fyrstu árini var hann bókhaldari, men seinnu árini, og nú hann andaðist, var hann fíggjarleiðari á virkinum.

Jóhannes var ein serstakur persónur, hann var ikki ein sum royndi at gera seg sjónligan, tvørturímóti var hansara persónsmenska soleiðis háttað, at hann gjørdi lítið og einki burtur úr sær sjálvum. Hann hevði ikki tørv á at hevja seg á nakran hátt. Hann var eyðmjúkur, lítillátin og spakførur. Jóhannes var dugnaligur og ærukærur, og hann arbeiddi við íðni og nærlagni.

Hansara trúfesti og solidaritetur móti arbeiðsplássi og starvsfólkum var framúr.

Nú Jóhannes ikki er ímillum okkara longur, kenna vit sorg, og tómrúmið er stórt.

Vit kendu hann sum okkara, hann var góður við okkum og vit við hann.

Í nærum 15 ár var hann trúfastur til arbeiðis, og gjørdist hann sostatt ein integreraður partur av fyritøkuni.

Jóhannes var ikki ein sum tosaði nógv, hansara rødd var ikki harðmælt



í kjakinum sum stundum kundi vera í kaffistovuni. Hann var persónurin, sum vit ein og ein kundu fara og tosa við. Tá gav hann sær stundir, og hann dugdi so væl at lurta. Hóast hann ikki kom fram við sterkum meiningum í stórari fjøld, so var eingin ivi um, at hann hevði meiningar, og hann visti og tordi at siga tað, sum hann hugsaði.

Hann var av sonnum ein av teimum sum vit nevna "tey stillu í landinum", honum tørvaði ikki so nógv orð, og tað bar eisini til at vera saman við honum uttan tey mongu orðini - og uttan at løtan tó var keðilig.

Vit kendu hann, sum ein tryggleika í fyritøkuni, hann var altíð her, vit kundu spyrja hann um alt, og hann gav sær stundir til hvønn einstakan. Jóhannes setti seg sjálvan so mangan til viks fyri at hjálpa og vegleiða okkum øðrum. Hann var av sonnum eitt stórt menniskja, og hann rúmaði so nógvum.

Nú hann ikki er meira, hava vit mist so nógv, vit hava mist ein kæran vin og samstarvsfelaga, og sorgin og saknurin kennast tung.

Vit hava djúpa samkenslu við tykkum hansara kæru, sum hann var so góður við.

Vit merktu, hvussu tit stóðu honum nær, og hvussu familjukærur hann var.

Góða Olga, børn við maka, barnabørn, mamma Jóhannesar og øll tykkara. Onkur hevur sagt tað soleiðis: "Stundum stillar Harrin stormin, men stundum letur Hann stormin leika í og stillar barnið". Mátti Harrin Jesus ugga tykkum, nú hesin stormurin rakti tykkum so meint.

Á virkinum KJ Hydraulik verður Jóhannes nógv saknaður, vit saknað okkara góða samstarvsfelaga og vin, og vit minnast við takksemi hansara stillføra hátt at vera uppá og takka fyri alt, sum vit fingu við honum.

Ærað veri minnið um Jóhannes Hansen.

**Lillian**

# Sjómanskvinnuringurin 50 ár

**Sjómanskvinnuringurin í KFUM & K í Klaksvík hevur verið til í 50 ár. Ringurin varð stovnaður 13. januar í 1959**

Stovnandi fundurin var í heiminum hjá John Munck, sum tá var trúboðari í Heimamissiónini.

Til stovnandi fundin møttu átta konur úr Klaksvík umframt kona trúboðaran, sum var donsk. Í fundarbókini standa nøvnini á teimum, og at Suffía (Fía) Lassen varð vald til fyribils formann.

Í leiðsluni fyri ringin sita Ása Heinesen, sum er formaður og Johild Johannesen.

*Kelda: www.trubodin.fo*



# Møtir í Vestmanna

Um vikuskiftið vera evangelisk møtir í Auluni á Vestmanna skúla.

Leygarkvøldið kl. 20, verður tað fyrra møti. Jógvan Mortensen og aðrir luttaka tað kvøldið við sangi og spæli. Sunnukvøldi kl. 18 verur tað seinna møti, har Kristina Bærendsen og onnur fara at luttaka við sangi og spæli. Bæði Jógvan og Kristina eru kend kring um á okkara oygjum. Talara hesi kvøldini vera: Rógvi Joensen, Bogi Simonsen, Jákup Hansen, Dia á Roykheyggji o.a. Kaffi verður áftana og møguleiki fyri samtalum og forbøn.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Christian Joensen, Oyrabakki** fer av Mørkini leygardagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju sunnudagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Christian kunnu lata Mørkini eina peningagávu. Konta í penigastovunum.

**Anna Sigrun Gaardsdal Lauristsen**, fødd Danielsen ættað úr Leirvík, búsitandi Gørlev andaðist 21. mars, 54 ára gomul. Jarðarferðin verður 1. apríl klokkan 13 úr Svellerup kirkju.

**Hjørleif Justesen, Tórshavn**, andaðist týskvøldið 24. mars, 61 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, abbi og langabbi okkara

**Ernst Wesenberg Samuelsen**

doyði og varð jarðaður.
Takk til Berg D. Joensen, prest, fyri troystarrík orð í heiminum og kirkjuni.
Tøkk til tykkum, sum vitjaðu hann í heiminum og á Landssjúkrahúsinum, sum ringdu og sendu heilsanir á ymiskan hátt.
Takk til tykkum á B6 og G3 á Landssjúkrahúsinum, sum vóru so góð við hann. Ein serlig tøkk til Kiwanis Rósuna og eisini takka vit Oasuni.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til krabbameinsfelagið. Tøkk til berarar, sangarar og øll tykkum, sum fylgdu honum hansara seinastu ferð her á fold.

*Familjunnar vegna*

**Maria, Johan og Ann Mari**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður mín og pápi okkara

**Sørin Johannes Frederiksen**

doyði og varð jarðaður.
Tøkk til tykkum mongu, sum á ymsan hátt stuðlaðu okkum, meðan Sørin var sjúkur.
Tøkk til tykkum á Landssjúkrahúsinum og Heimarøktini, sum gjørdu tykkara til, at seinasta tíðin hjá Sørini gjørdist virðilig.
Tøkk til Hera Joensen fyri troystrarrík orð í kapellinum og kirkjuni, tøkk til Kim Hansen fyri vakran sang í kirkjuni, tøkk kirkjutænarar, berarar og sangarar.
Øllum tykkum, sum komu at fylgja og á ymsan hátt hjálptu til og stuðlaðu við jarðarferðini og ervinum, takka vit hjartaliga.
Takk til skúlafelagar úr Eysturskúlanum og foreldur, tøkk til góðar vinir og starvsfelagar á Almannastovuni.
Takk fyri heilsanir og blómur, og tøkk til tykkum mongu, sum sendu børnunum peningagávur.

**Elisabeth, Tóki og Silja**